## Mongum brestur ætlan

Ein roynd hjá amerikonsku stjórnini at seta kílar ímillum Sýrialand og Iran hevur eftir øllum at døma fingið tey bæði londini at nærkast hvør øðrum. Eftir ein fund í Damaskus í gjár kunngjørdu forsetarnir Bashar al-Assad og Mahmoud Ahmadinejad (myndin), at teir høvdu gjørt av at gera tað lættari hjá fólki at ferðast millum londini bæði. Tað var ikki ætlanin, tá USA herfyri gjørdi av at seta ein sendiharra í Sýrialandi. Tvørturímóti ætlaði USA at fáa Sýrialand at virka fyri friði í Miðeystri og tættari tilknýti til Vesturheimin. Men úrslitið bleiv tað beint øvugta, skrivar AP.



## Løgreglustjórin skotin

Ósemja í teirri ovastu leiðsluni í algerisku løgregluni hevði í gjár við sær, at landsins ovasti løgregluleiðari bleiv myrdur inni á sínari egnu skrivstovu. Sjónvarpsstøðin al-Arabiya sigur, at drápið var hevnd, og at drápsmaðurin er ein týðandi embætismaður í løgregluni, sum varð uppsagdur herfyri. Algerisku fjølmiðlarnir siga, at tann myrdi ovastin var illa umtóktur millum tær víðgongdu islamistisku kreftirnar, tí hann royndi at fáa fleiri kvinnur upp í løgregluna.




*Bjørt Samuelsen vil vita frá landsstýriskvinnuni, hvat hon ætlar at gera við vaksandi talið av klamydia tilburðum millum tey ungu*

# Føroyskir ungdómar kynsliga óansnir

**Talið á klamydiatilburðum í Føroyum er vaksið í stórum seinasta árið. Í 2004 vóru staðfestir 146 tilburðir, sum var tað hægsta talið til tá. Men í 2008 vóru 201 tilburðir staðfestir, og tølini fyri 2009 síggja út til at vera á sama støði. Tað hevur fingið Bjørt Samuelsen úr Tjóðveldi at spyrja Helenu Dam á Neystabø fýra spurningar um undirvísing um kynssjúkur og kynslív í skúlanum**

KYNSSJÚKUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Vit vita, at kynssjúkur eru sera vanligar millum ung í Føroyum. Hesar sjúkur kunnu hava sera álvarsamar avleiðingar. Sum dømi kunnu nevnast, at klamydiaígerð kann hava barnloysi við sær, eins og HPV-virus kann elva til krabbamein í lívmóðurhálsinum.

Tað sigur Bjørt Samuelsen úr Tjóðveldi í viðmerkingum sínum til fýra fyrispurningar, sum hon setti Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu í undirvísingarmálum herfyri.

Fyrispurningurin var skrivligur, og mikudagin í farnu viku fekk Bjørt Samuelsen so svar (sí yvirav).

Bjørt Samuelsen vísir á, at 7. hvør føroyingur er smittaður við klamydia. Hesi tøl eru grundað á hagtøl yvirung, sum hava latið seg kannað fyri sjúkuna í fyrraárið.

Talið á tilburðum er vaksið nógv seinastu árini, og størstur er títtleikin ímillum ung í aldrinum 15-29 ár. Havast skal eisini í huga, at tað eru verri enn so øll, sum hava klamydia, ið lata seg kanna, tí ofta vita tey ikki av, at tey eru smittað.

- Tá ein veit, at lætt er at verja seg ímóti klamydiu við at nýta hýt, so benda tølini greitt á, at neyðug fyribyrging ikki verður nýtt. Og tað merkir eisini, at vandin fyri at verða smittaður við øðrum kynssjúkum er stórur. Lítið er at ivast í, at holl undirvísing í kynsligari heilsu, hevði kunnað gjørt stóran mun til tess at fyribyrgja kynssjúkur, sigur Bjørt Samuelsen í viðmerkingunum.

### Holl undirvísing

Bjørt Samuelsen fílist á, at einki verður nevnt um kynssjúkur og fyribyrging av hesum í fólkaheilsuætlanini hjá føroyingum. Hon sigur, at Landslæknin og Fólkaheilsuráðið gera eitt ávíst arbeiði at seta fokus á kynssjúkur, eitt nú við at upplýsa um vaksandi talið av tilburðum av eitt nú klamydia.

- Men síðani AIDS-ráðið varð niðurlagt og umskipað til Fyribyrgingarráðið (nú Fólkaheilsuráðið), tykist fokusið á fyribyrging og hetta at nýta hýt vera minkað munandi. Og sum heild tykist økið ikki at fáa tað uppmerksemi, tað átti at fingið, tá hugsað verður um, hvussu stóran týdning tað hevur fyri tey ungu og teirra vaksnamannalív, sigur Bjørt Samuelsen í viðmerkingunum.

Heldur ikki, tá talan er um undirvísing innan kynssjúkur er støðan nøktandi. Ein kanning hjá Maluni Egholm vísir, at hvørki lærarar ella næmingar nøgdir við støðið á undirvísingini í kynsligari heilsu.

- Í ritgerðini verður víst á, at skúlarnir fylgja einari gamlari vegleiðandi lesiætlan frá 1993. Hvørki lærarar ella næmingar eru nøgdir við støðið á undirvísingini um kynslív, og teir lærarar, sum undirvísa, hava ongan serstakan førleika at undirvísa ungum um hetta evnið. Í flestu førum eru tað lærararnir í lívfrøði, ið verða settir at taka sær av undirvísingini, sigur Bjørt Samuelsen.

Hon heldur, at lítil ivi er um, at dygdargóð undirvísing í kynligari heilsu veruliga kann hava stóra ávirkan á tey ungu og atburð teirra.

- Holl undirvísing um kynslív er neyðug - bæði til tess at fyribyrgja kynssjúkum og at sleppa undan álvarsomum trupulleikum sum barnloysi, men eisini fyri at geva teimum ungu førleika til sjálvi at taka avgerðir, seta mørk og vera búgvin at skapa sær eitt sunt og gott kynslív, sigur Bjørt Samuelsen.

### Internetið ávirkar

Løgtingskvinna Tjóðveldi minnir eisini á, at vandi er í hvørjari vælferð, tí meðan undirvísingin í skúlunum letur nógv eftir at ynskja, floymir tað við kunning um sex á internetinum. Og tað er langt frá bert av tí góða.

- Ofta er harðskapur og eyðmýking sentralir partar av innihaldinum, har gentiurnar verða settar fram sum ein vøra, man kann gera har nær sagt hvat sum helst við, eins og dreingirnir kunnu fáa eina mynd av, at bonsk framferð og harðskapur er vanligur partur av einum kynslívi. Hetta kann skeikla fatanina hjá teimum ungu av kynslívinum, sigur Bjørt Samuelsen.

Hon heldur, at stóri spurningurin er, hvørt ung fólk, sum standa á gáttini til vaksnamanna- og kynslívið, hava neyðugu filtrini at sortera og fyrihalda seg kritisk til handilsgjørda kynslívið, ella um tey eru í vanda fyri at fáa fatanina av at "soleiðis eigur ein at gera".

- Hetta sera álvarsama evnið varð eisini umrøtt á norðurlendsku ráðstevnunum um Javnstøðu í skúlunum, sum varð hildin í Føroyum í fjør summar. Ein niðurstøða var, at skilagóð undirvísing og kjak í skúlunum kundi givið teimum ungu neyðuga mótvágina, so tey duga at taka dagar ímillum og at vera kritisk til floymin av kommersiellari upplýsing um kynslív, sigur Bjørt Samuelsen at enda í viðmerkingum sínum til fyrispurningin.